# Kjak



**Edmund Joensen**
*Løgtings- og fólkatingsmaður fyri Sambandsflokkin*

# Innast inni er Høgni Hoydal glaður fyri R-frádráttin

*Onkunstaðni langt inni í sær sjálvum er Høgni Hoydal glaður fyri, at lesandi føroyingar í Danmark við R-frádráttinum fáa betri fíggjarligar umstøður. Hann kann bara ikki siga tað alment*

Nú er Høgni Hoydal desperatur.

Í einum lesarabrævi er hann harðliga ímóti, at lesandi føroyingar og grønlendingar í Danmark fáa ein skattafrádrátt á 71.000 kr., meðan filipinarar, kinverjar, belgiumenn og øll onnur útlendsk lesandi í Danmark eru skerd niður á 41.900 kr. í frádrátti.

Skil tað hann, ið skilja tað kann. Hetta er maðurin, sum sigur seg verja áhugamálini hjá føroyingum kring allan heim.

## Tann rætta forsøgan

Fólkatingsmaðurin hjá Tjóðveldi roynir í lesarabrævi sínum at reingja veruleikan og – sum hann er vanur – at fremja eitt karaktermorð, hesuferð móti undirritaða.

Í stuttum er fakta í málinum hetta:

Danska stjórnin hevur tikið avgerð um, at tann generelli skattafrádrátturin til øll útlendsk lesandi í Danmark (formliga heitið er "Gæstestuderendefradrag", sum í Føroyum hevur gingið undir navninum "Føroyafrádráttur") skal skerjast úr 71.000 kr. árliga niður í 41.900 kr. árliga.

Tað er ein erliga sak, at danska stjórnin vil skerja ein frádrátt til filipinarar, kinverjar, týskarar o.o.. Sum fólkatingsmaður úr Føroyum havi eg onga meining um hetta.

Hinvegin eri eg ímóti, at ein skerjing av "Gæstestuderendefradrag" skal raka føroyingar og grønlendingar.

Tí havi eg gjørt eina týðandi semju við donsku stjórnina. Henda semja verður í næstum gjørd til lóg í Danmark. Semjan ber í sær, at ein nýggjur frádráddur skal setast inn í donsku álíkningarlógina.

Hesin frádrátturin skal fevna um føroyingar og grønlendingar, sum lesa í Danmark, og hann skal bera í sær, at føroysk og grønlendsk lesandi skulu ikki í sama pott sum onnur sum kinverjar, týskarar, filipinarar o.o.

Frádrátturin, sum verður settur inn í álíkningarlógina, verður nevndur R-frádráttur (Ríkisfelagsskaps-frádráttur). Hví? Jú tí hann fevnir um føroyingar og grønlendingar, sum bert fáa henda frádrátt, tí Føroyar og Grønland eru við í Ríkisfelagsskapinum. Eitt náttúrligt og logiskt heiti.

Saman um tikið: Nýggi R-frádrátturin gevur lesandi føroyingum og grønlendingum munandi meira í skattafrádrátti, enn onnur fáa. Hví? Tí Ríkisskapurin gevur henda rætt.

## Líktornið hjá Hoydal

At Høgni Hoydal úr Norðuratlantsbólkinum á Fólkatingi er ímóti, at lesandi úr Norðuratlantshavi fáa ein kontantan fyrimun í form av einum góðum skattafrádrátti,

At hann eisini er ímóti, at R-frádrátturin eitur R-frádráttur, er eisini høvuðpínan hjá manninum sjálvum.

Hetta kann Høgni Hoydal berjast við inni við seg sjálvan og kanska fortelja teimum lesandi, tá hann hevur funnið uppá onkra forkláring. Ella burturforkláring.

Tað, sum helst nívir fólkatingsmannin hjá Tjóðveldi mest av øllum, er, at hann sær, hvussu væl Ríkisfelagsskapurin virkar.

Ikki nokk við, at Ríkisfelagsskapurin hevur vart Føroyar og alla uppsparing hjá føroyingum í einari heimsfevnandi búskaparkreppu, sum eitt nú skræddi teppið undan Íslandi.

Nú fáa lesandi føroyingar í Danmark ein nýggjan kontantan fyrimun av Ríkisfelagsskapinum.

## Innast inni

Hetta er ræðuligt hjá Høgni Hoydal. Hann plagar í berari misskiltari nationalismu at nevna Ríkisfelagsskapin eina "mytu". Men nú fær hann annað at síggja. Nú dagar sannleikin fram, og tað fellur ikki í krammið hjá honum.

Tað er púra upp til fólkatingsmannin hjá Tjóðveldi at dæmonisera onnur og undirgrava arbeiði teirra. Hetta toli eg væl, tí vit vita øll, hvussu hann arbeiðir.

Hópin av fólki – ikki minst tey lesandi sjálvi – eru fegin um nýggja R-frádráttin.

Man ikki Høgni Hoydal onkunstaðni langt inni í sær sjálvum vera glaður fyri, at lesandi føroyingar í Danmark fáa betri fíggjarligar umstøður?

Tað mugu vit vóna.

Hann kann bara ikki siga tað alment.

---

allari verðini fekk stjórnaruppskotið yvirhøvur nakra undirtøku? Hvat var tað, sum viðhaldsmenninir hjá stjórnaruppskotinum førdu fram, sum fekk fekk nakran veljara at taka undir við tí, og hvat er tað, somu kvinnur og menn og flokkar føra fram tann dagin í dag?

Vit vita øll svarið: Tað er stuðulin úr Danmørk. Tann, sum lesur orðaskiftið upp undir fólkatkvøðuna í tátíðar bløðum sær skilliga, at tá eins og nú verður sagt, at hesin stuðul er av tí góða fyri okkum. Tey, sum hava minstu hilling fyri økonomi vita sjálvandi at hetta er tvætl, men higartil hevur tað eydnast stuðulsfjepparunum at villleitt ein nóg stóran part av tjóð okkara til at halda, at samfelagið er vorðið betri fyri av tí, at vit hava fingið stuðul, og hevur hetta givið teimum politiskt vald.

Tann hvøkkur, sum danska stjórnin fekk í 1946, lærdi hana, at tað var umráðandi at vaksa enn meir um stuðulin til Føroya og harvið keypa sær undirtøku, og fyri ikki um at tala undirdíkja hin partin av ríki okkara, sum er Grønland, við stuðli.

Stuðulin hevur havt somu avleiðingar her sum alla aðra staðni. Hann verður veittur teimum, sum valdið hava, og hann førir mutur við sær. Vit hava fingið ein yvirklassa, sum válkar sær í stuðlinum. Nakrir gerast beinleiðis stuðulsfjepparar, og fylla fjølmiðlarnar við lygusøgum um, at stuðulin er av tí góða, ikki bert fyri teir sjálvar, sum jú er satt, men eisini fyri alt samfelagið, og fær sannført nøkur í undirklassunum um at hann eisini er góður fyri tey. Samstundis nýta stuðulsmóttakararnir tað politiska vald, sum hesar veitingar geva teimum, til at eyðræna tey sum lægri eru á tignarstiganum, soleiðis at livikorini hjá smámanninum í Føroyum eru enn verri enn nakra aðra staðni í Norðurlondum. Stuðulin er tí eingin lívgevi, men er beinleiðis sorl av øllum framtaksmøguleikum í einum ríki.

## Hví ikki taka stuðulin av donsku fíggjarlógini?

Men so sterkur er orðrómurin til frama fyri stuðli, at hóast føroyski sjálvstýrisvongurin mestsum alla tíðina síðani 1946 hevur havt umboð á tí fólkatingi, sum sendir okkum hetta eitur, er ikki so mikið sum eitt pinkalítið uppskot komið frá nøkrum av hesum umboðum um at fólkatingið skal taka stuðulin av fíggjarlógini. Einasta orsøkin til hetta má vera, at teir ikki halda hetta vera politiskt opportunt. Teir hava hildið at veljararnir hava verið so heilavaskaðir, at atkvøðumissur stóðst av at seta fram eitt so skilagott uppskot.

## Stuðulin brandólógligur

Burtursæð frá tí fíggjarliga høpisloysi, sum stuðulin umboðar, so er hann eisini ólógligur. Bjørgvinarsáttmálin sigur jú, at annað ríki ikki skal leggja upp í innanhýsis viðurskiftunum í hinum ríkinum.

Men stuðulsveitingingin er beinleiðis uppílegging í viðurskiftini í tí javnsetta deilríkinum, og er í stríð við henda altjóða sáttmála, sum ásetur tær reglur, sum eru galdandi okkara ríki og Danmarkar ríki millum. Hesum brotsverki fyri at takka hevur tað eydnast at mutra seg til ein meiriluta á løgtingi, sum gongur donsku politisku flokkunum til handa við ikki at vera fólksins vilja lýðin. Hetta brotsverk fór fram fyri 1946 eins og hetta ár. Tá var stuðul latin. Men hvat við øllum tí eitri, sum hevur fossað inn í okkara samfelag hvønn einasta dag síðani? Bæði tað sum tá varð gjørt og tað, sum er hildið á hvønn dag síðani er eins stórt brotsverk. Hevði hetta brotsverk ikki verið framt, og løgtingið sloppið til at tikið avgerðir uttan hesa ólógligu útlendsku uppílegging, er einki at ivast í, at tað hevði verið fólksins kláru vegleiðing lýðið, so sum tjóðin gav tí tann 14. september 1946. Løgtingið er tí ikki legitimt og umboðar ikki tað vanliga fólkið, demos, men er ikki demokratiskt og umboðar bert teir fáu stuðul sgøðingarkálvarnar.

Tað, sum neyðugt er hjá okkum, er at avdúka brotsgerðina, støðga henni og fáa demokrati í lag her á landi, so løgtingið fer at taka rættar avgerðir, sum fara at bøta um lívskor fólksins. Hetta ber væl til. Vit hava eitt gott fólk í einum góðum landi, og taka vit røttu avgerðirnar uttan ólógliga uppílegging uttanífrá, stendur ein ljós framtíð okkum fyri stavn. Fólkaatkvøðan í 1946 er tí ikki ein fjar søga, men er dagsaktuellur politikkur, og skulu vit koma nakra leið fram móti tí máli, at øll tey, sum her eru fødd, skulu liva við sømd í føðilandinum, er alneyðugt hjá okkum at fylgja tí leiðbeining, tjóðin tá gav, og sum skjótast fáa demokrati í landi okkara, so vit gerast eitt sjálvstøðugt ríki í heimssamfelagnum.